**Álit**

**í**

**ungdómstingsmáli nr. 5/2012: Uppskot til samtyktar um at skipa fjarlestur sum sjálvstøðuga skúlaskipan**

Nám X , Eysturskúlin hevur lagt málið fram hin 6. februar 2012, og eftir 1. viðgerð 6. februar 2012 er tað beint í Mentanarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 6. februar 2012.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Føroya lærarafelag.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin** (Vigdis Mellemgaard, Benjamin Rajani, Virgar Johansen, Egi Djurhuus, Rani Johansen, Anna Nolsøe Joensen, Sascha Due Niclassen, Svanna Olsen og Gutti Christiansen) heldur, at uppskotið um at skapa møguleikar at nema sært víðari útbúgving við fjarlestri, serliga fyri meira tilkomnar næmingar, er neyðugt fyri, at teir skulu fáa møguleikan at fáa víðari útbúgving.

Meirilutin tekur tí undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja tað.

**Minnilutin** (Tóri Nielsen og Mike Gaardlykke) heldur ikki, at útreiðslurnar til hetta tilboðið standa mát við vinningin. Um fólk ynskja at fáa sær víðari útbúgving við fjarlestri, eigur hetta at kunna gerast heimani frá, frá egnari teldur. Neyðugt er ikki, at landið stovnar serlig støð til hetta endamál.

Minnilutin er av teirri fatan, at tað í mangar mátar er gott, at ungdómur okkara fær møguleikan at koma uttanlands at læra. Minnilutin skilir ikki pástandin um, at tey ungu ikki koma heim aftur aftan á loknan lestur. Um vit skapa eitt gott samfelag, so vilja tey koma heim.

Minnilutin tekur tí ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja tað.

**Mentanarnevndin, 7. februar 2012**

Vigdis Mellemgaard    Benjamin Rajani    Virgar Johansen

Egi Djurhuus    Rani Johansen    Anna Nolsøe Joensen

Tóri Nielsen    Sascha Due Niclassen    Mike Gaardlykke

Svanna Olsen    Gutti Christiansen